# etta sær á


Mynd: Jens Kristian Vang

ligið stavn um stavn við seks FM heitum í part. Nú er Eysturoyingur lopin ein skut framum argasta kappingarneytan í ár. Ólavsøkuróðurin kundi boðað frá, at vestmenningar aftur næsta ár fara at leggja til brots í tí kappingini.

Og so er eftir at vóna, at uppaftur fleiri fara at bjóða av. Sámal Hansen er júst liðugur við ein nýggjan Havnarbát, sum tað sjálvsagt má roknast við fer at bjóða seg fram, og klaksvíkingar droyma um at taka tráðin uppaftur frá í fjør, tá ið teir vunnu trivaligan ólavsøkusigur og harvið tryggjaðu sær FM heitið.

Um Eysturoyingur fer at royna at verja FM heitið, og um Hoyvíkingur fer at gera enn eina roynd at vinna fyrsta FM heitið í hesi kapping til Argja Róðrarfelag, so fer talan at vera uppaftur fjøltáttaðari og vónandi eins spennandi kapping, sum hon hevur verið tað í ár.

## Gongdin í finaluni

Vestmenningur sprakk avstað, og Vestmenningur var fremstur allan teinin. Tá ið bátarnir nærkaðust Molanum legði Eysturoyingur upp á síðuna av Vestmenninginum, men so tóku vestmenningar nøkur rimmar tøk, ið legði Vestmenning ein skut framum aftur.

Í endaspurtinum dróg rættuliga saman. Eysturoyingur gekk sera væl á síðstu metrunum, men á málinum var Vestmenningur eitt vet frammanfyri.

Hoyvíkingur hekk væl uppií. At hann var hálva bátslongd aftanfyri Eysturoying bar við sær, at hann ikki fekk ávirkan á, hvør av hinum báðum skuldi vinna FM.

Norðingur bjóðaði seg fram fyri fyrstu ferð í ár, men hann spældi ikki nakran leiklut og endaði væl aftanfyri hinar tríggjar.

trondur@sosialurin.fo

| | |
|---|---|
| 1 Vestmenningur | 04:03.24 |
| 2 Eysturoyingur | 04:04.08 |
| 3 Hoyvíkingur | 04:06.08 |
| 4 Norðingur | 04:15.01 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Eysturoyingur (FM vinnari) | 46 |
| 2 Vestmenningur | 45 |
| 3 Hoyvíkingur | 35 |
| 4 Norðingur | 4 |


Mynd: Jens Kristian Vang

# Argjabáturin koppaði øllum á

**8-MANNAFØR Hóast Kvívíkingur vann fýra av sjey róðrum í ár, so eydnaðist tað argjamonnum við sigrinum á Ólavsøku at endurvinna FM heitið**

Tróndur Arge

Tá ið kvívíkingar og argjamenn fylgdust norður aftur, eftir at teir høvdu kappast á Jóansøku í Vági, var tað einki – púrt einki – sum bendi á, at Kvívíkingur á Ólavsøku ikki skuldi taka ímóti gullkrónunum sum tekin um, at kvívíkingar høvdu vunnið meistaraheitið.

Soleiðis gekk tað ikki. Eftir ólavsøkuróðurin vísti stigatalvan 44 stig til Kvívíkingin og 44 stig til Argjabátin. Tá ið tað stendur á jøvnum siga reglurnar, at tann báturin, sum var stinnari í ólavsøkuróðrinum, er meistari, og í tí kappingini var eingin ivi:

Argjabáturin stakk seg beinanvegin framum hinar bátarnar, og Argjabáturin var fremstur alla tíðina. Á málinum var hann eina hálva bátslongd frammanfyri Kvívíking.

Kvívíkingar fingu betri start hesa ferð, enn teir hava fingið seinastu ferðirnar, men tað var ikki kappingina um fremsta plássið, sum Kvívíkingur fram við Molanum vóru noyddir at savna seg um. Heldur var tað um næstfremsta plássið, har Fríggjarin eina løtu var frammanfyri Kvívíking.

Á málinum var hálvur stavnurin á bláa Kvívíkingi frammanfyri hvíta stavnin á Fríggjaranum, meðan Árnfirðingar fyri fimtu ferð í ár endaði á fjórða plássi. Hinar báðar ferðirnar var hann nummar trý.

Argjabáturin endurvann FM heitið, hóast hann bara vann tríggjar ferðir, og hóast hann á Eystanstevnu endaði á triðja plássi.

Kappingarárið hjá kvívíkingum endaði ikki soleiðis,sum tað sá út til, at tað skuldi gera, tá ið fýra av sjey kappingum vóru avgreiddar. Samstundis sum Argjabáturin rættuliga kom fyri seg, so kostaði tað kvívíkingum gullkrónurnar, at teir bæði á Fjarðastevnu og Vestanstevnu komu á mál aftanfyri bæði Argjabátin og Fríggjaran, sum so rudduliga vann kappingina um bronsukrónurnar, men hesa ferð akkurát ikki megnaði at halda tørn um næstfremsta plássið, ið hann hevði vunnið tvær tær undanfarnu ferðirnar.

Vertirnir vóru blíðir, tí Ørvur og Knørrur fylgdu øllum hinum til døરs!

| | |
|---|---|
| 1 Argjabáturin | 04:13.03 |
| 2 Kvívíkingur | 04:15.05 |
| 3 Fríggjarin | 04:15.08 |
| 4 Árnfirðingur | 04:17.11 |
| 5 Ørvur | 04:25.06 |
| 6 Knørrur 04:26.02 | |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Argjabáturin (FM vinnari) | 44 |
| 2 Kvívíkingur | 44 |
| 3 Fríggjarin | 36 |
| 4 Árnfirðingur | 30 |
| 5 Ørvur | 18 |
| 6 Knørrur | 17 |